# Súgkjaftar (Insecta: Hemiptera) í Føroyum

## *Hemiptera in the Faroe Islands*

***Leivur Janus Hansen[1] og Jens-Kjeld Jensen[2]***
[1] Tjóðsavnið, Kúrdalsvegur 15, FO-188 Hoyvík. Email: janush@savn.fo
[2] Í Geilini 37, FO-270 Nólsoy. Email: jkjensen@olivant.fo

## Úrtak

Í hesi grein verða seks sløg av súgkjaftum: *Eurydema oleracea* (Linnaeus, 1758), *Eurydema ornata* (Linnaeus, 1758), *Nezara viridula* (Linnaeus, 1758), *Coreus marginatus* (Linnaeus, 1758), *Leptoglossus occidentalis* Heidemann, 1910 og *Phyllaphis fagi* (Linnaeus, 1761) lýst fyri fyrstu ferð í Føroyum. Eitt fullfíggjað yvirlit er gjørt yvir hesi sløg og øll hini sløgini av Hemiptera, sum higartil eru skrásett í Føroyum. Harumframt eru føroysk nøvn sett á úrvald sløg og onnur flokkingarstig í hópinum Hemiptera.

## Abstract

Six species of Hemiptera are recorded in the Faroe Islands for the first time: *Eurydema oleracea* (Linnaeus, 1758), *Eurydema ornata* (Linnaeus, 1758), *Nezara viridula* (Linnaeus, 1758), *Coreus marginatus* (Linnaeus, 1758), *Leptoglossus occidentalis* Heidemann, 1910 and *Phyllaphis fagi* (Linnaeus, 1761). A complete overview is given of all species of Hemiptera recorded from the Faroe Islands. In addition selected species and taxa are given Faroese names.

## Inngangur

47 sløg av súgkjaftum (Hemiptera) eru áður skrásett í Føroyum (talva 1). Flest teirra hava fólk sum heild ikki serligan kunnleika um, men eyðvitað eru tey sløgini, ið hava einhvørja beinleiðis ávirkan á fólk, djór, hús ella vøkstur, mest kend millum fólk. Eins og føroyska navnið bendir á, hava djór í hesum hópi tað sereyðkenni, at tey hava kjaftlimir at súgva við.



**Fenteka *Salda littoralis* (Linnaeus, 1758). Her síggjast súgvandi kjaftlimirnir, sum hópurin hevur fingið navnið eftir. Mynd: Leivur Janus Hansen.**

Fróðskaparrit 65. og 66. bók: DOI: http://dx.doi.org/10.18602/fsj.v0i0.112

## Skrásett sløg

Elsta skráseting av súgkjafti í Føroyum er at finna í *Indberetninger fra en reise i Færøe 1781 og 1782* eftir J.C. Svabo (Svabo, 1959). Har stendur at lesa, at „Veggjalús *cimex aptera*, er sjelden, og rimeligen bragt til Landet i Meubler fra Kjøbenhavn." Síðan hevur Hansen (1881) 6 skrásetingar: Tvær froðusprettur: ríputeka (*Pithanus maerkelii*), fenteka (*Salda littoralis*) og bæði sløgini av bátsmanstekum, tjarnarteka (*Arctocorisa carinata*) og hyljarteka (*Callicorixa wollastoni*). Newstead (1904) skrásetur sekkjarskjaldlús (*Arctorthezia cataphracta*). Síðan verða 14 sløg løgd afturat í *Zoology of the Faroes* (Henriksen, 1929; Jørgensen, 1932). Heie (1972) leggur 6 sløg afturat, og Trolle & Ketil (1994a, 1994b) leggja 8 sløg afturat. Tolsgaard og Jensen (2010) skráseta 11 nýggj sløg, tó er ivasamt, um nakað av hesum sløgum hevur sjálvstøðugan bústovn í føroysku náttúruni. Í hesi grein verða 6 sløg løgd afturat. Hervið eru 53 sløg av súgkjaftum skrásett í Føroyum.

Í hesi grein og í greinini hjá Tolsgaard og Jensen (2010) eru nýggu sløgini einstakar lívverur ið mugu metast sum innsløðingar. Í áðurnevndu eldri keldum sæst, at flestu sløgini eru savnaði úr sjálvstøðugum stovnum og ikki sum einstakar innsløddar lívverur. Heie (1972) metir, at av teimum 16 sløgunum, sum hann nevnir, eru tað 10 ið eru knýtt at urtagarðsplantum.

Nøkur av skrásettu sløgunum eru innslødd ella hava flogið higar uttan tó at festa búgv, men ógreitt er, hvussu nógv hesi eru (Tolsgaard & Jensen, 2010). Hetta samsvarar við eygleiðingar av fleiri sløgum í øðrum skordýrahópum, sum seinnu árini hava fest búgv í Føroyum og eru vorðin meira og minni vanlig. Summi sløg hava uttan iva ferðast higar á natúrligan hátt, og onnur eru komin higar við fólki ella farmi. Nevnast kunnu vanlig vespa (*Vespula vulgaris*) og týsk vespa (*Vespula germanica*) (Jensen & Bloch, 2001), fótgul bressa (*Eristalis pertinax*) (Jensen, 2009) og húshumla (*Bombus lucorum*) og akurhumla (*Bombus pratorum*) (Jensen & Madsen, 2013).

Í teimum áðurnevndu og í øðrum útgávum eru sløgini stundum nevnd við øðrum frøðiheitum. Eitt nú er fenteka *Salda littoralis* (Linnaeus 1758) fyrstu ferð skrásett av Hansen (1881), men tá er hon skrásett við navninum *Salda litoralis*, og Henriksen (1929) skrásetti hana við navninum *Acanthia littoralis*. Í hesi grein eru samheiti, ið ikki verða nýtt longur, ikki tikin við.

Flokking og vísindalig nøvn á sløgum og ættum eru grundað á GBIF (GBIF Secretariat, 2017), og undirhóparnir eru grundaðir á PESI (PESI, 2017). Sløgini eru skipað í stavrað og ikki eftir flokkingarskipan.

## Nakrar nýggjar skrásetingar

Allar seks skrásetingar, sum eru tiknar við í hesi grein, eru av sløgum, sum ikki eru skrásett áður. Tey eru øll skrásett síðan útgávuna eftir Tolsgaard og Jensen í 2010.

## *Coreidae*

**_Coreus marginatus_ (Linnaeus, 1758)**
Nólsoy, 1 lívvera, 20.xii.2012, leg. Jacoba Thomsen.



*Coreus marginatus* (Linnaeus, 1758).
Mynd: Jens-Kjeld Jensen.

**_Leptoglossus occidentalis_ Heidemann, 1910**
Streymoy, Tórshavn, 1 lívvera, 17.xii.2016, Pætur M. Dahl sambært mynd.
Streymoy, Tórshavn, innandura, 1 lívvera, 7.ix.2018, leg. Leivur Janus Hansen, FOMNH-20422



Furuteka *Leptoglossus occidentalis* Heidemann, 1910.
Mynd: Leivur Janus Hansen.

## *Pentatomidae*

***Eurydema oleracea* (Linnaeus, 1758)**

Streymoy, Tórshavn, innandura, 1 lívvera, 10.i.2017, leg. Arnhold Olsen, FOMNH-19891.



*Eurydema oleracea* (Linnaeus, 1758). Mynd: Jens-Kjeld Jensen.

***Eurydema ornata* (Linnaeus, 1758)**

Streymoy, Tórshavn, innandura, 1 lívvera, 12.ix.2016, leg. Katrin Kallsberg.

Eysturoy, Strendur, innandura, 1 lívvera, 18.x.2016, leg. Helga Bára M. Vang, FOMNH-19890.



*Eurydema ornata* (Linnaeus, 1758). Mynd: Jens-Kjeld Jensen.

***Nezara viridula*** **(Linnaeus, 1758)**

Streymoy, Tórshavn, innandura, 1 lívvera, 12.xi.2012, leg. Kristina Eldevig.

Vágar, Vatnsoyrar, í bingju úr Miðevropa, 2 lívverur, 19.x.2016, leg. Óli Lydersen, FOMNH-19896, 19897.

Streymoy, Tórshavn, í bili úr Ungarn, 4 lívverur, 19 & 22.xi.2016, leg. Dánial Jespersen og Páll Rói Poulsen, FOMNH-19892, 19893, 19894, 19895.

Eysturoy, Toftir, innandura, 1 lívvera, 12.xi.2016, leg. Sóleyg Smidt.

## *Aphididae*

***Phyllaphis fagi*** **(Linnaeus, 1761)**

Streymoy, Tórshavn, í urtagarði, 1 lívvera, 12.vi.2012, Jógvan Hansen sambært mynd.

Streymoy, Tórshavn, í urtagarði, 4 lívverur, 10.vi.2018, leg. Dánial Jespersen, FOMNH-20181.

*Leptoglossus occidentalis*, ið er nevnd omanfyri, hevur síðan 1990-talið spreitt seg frá vestara parti av USA til stórar partar av heiminum, og henda teka er nú í øllum londum í Evropa (Endrestøl & Hveding, 2017). Hon spjaðist við fólki ella farmi, men er eisini sjálv før fyri at spjaða seg. Í Noregi er hendan tekan sett á svartalista (Gederaas *et al.*, 2012). Orsøkin er, at hon kann nørast á nálatrøum og gera skaða á trøini. Harumframt legst hon eisini inn í hús og kann gera skaða har (Endrestøl & Hveding, 2017). Hon kann eisini seta hol á PEX-vatnrør (Bates, 2005). Hetta slagið av rørum verður eisini nýtt í Føroyum.

## Føroysk nøvn

Í hesi grein fær skordýrahópurin Hemiptera føroyskt navn, og føroyskt navn verður eisini sett á nøkur viðkomandi flokkingarstig (Jensen & Simonsen, 2004) í hópinum. Áður hevur føroyskt navn verið nýtt um onnur flokkingarstig í hópinum, og tey eru m.a. at finna í Føroysku orðabókini (Poulsen *et al.*, 1998), eitt nú teka (Homoptera), froðuspretta (Cicadidae) og blaðlús (Aphididiae). Vit hava í mestan mun nýtt hesi nøvn, men hava tey ikki verið hóskandi, hava vit lagað tey til.

Nýggju nøvnini, sum vit hava ásett, lýsa útsjónd, lívshátt ella eyðkenni við slagnum ella leggja seg upp at norðurlendska ella enska frøðiheitinum. Tey flokkingarstig, ið her verða víst til, eru hópur (t.e. Hemiptera), fýra undirhópar, 17 ættir og 53 sløg.

Navnið á einum hægri flokkingarstigi (t.e. slekt og uppeftir) í sambandi við djóraflokkingarfrøði hevur altíð taksonomiska frøðinevnið sum eftirlið. Sostatt hevur navnið á einum hópi altíð *-hópur* sum eftirlið, og navnið á eini ætt hevur altíð *-ætt* sum eftirlið o.s.fr. Tó verður frøðiheitið sera sjáldan nýtt í talu og skrift, tí vanliga verður fólksliga navnið nýtt og ikki navnið á flokkingarstiginum. Sum dømi kann nevnast, at á gerandismáli nýta vit orðini firvaldar og svartaklukkur, men føroysku frøðiheitini eru ávikavist firvaldahópur og svartaklukkuætt.

Heldur enn at hava eina fasta reglu um, hvat flokkingarstig fær føroyskt navn, hava vit valt út tey flokkingarstig, sum vit meta hava tørv á einum føroyskum navni. Tað eru ikki øll sløgini, men einans tey, ið vit meta, at almenningurin kann kenna mun

á og kann hugsast at hava spurningar um ella viðmerkingar til. Vit hava sett navn á tey flokkingarstig, har vit meta, at almenningurin ikki hevur tørv á ella førleika til, at gera mun á einstøkum sløgum, slektum ella ættum, undir hesum flokkingarstigi. Sostatt hevur undirhópurin Cicadomorpha fingið føroyskt navn, men ikki ættirnar ella sløgini í hesum undirhópi.

Talva 1: Undirhópar, ættir og sløg av súgkjaftum, ið eru skrásett í Føroyum, sett í stavrað. Føroyska frøðiheitið á lívverunum er í høgra teigi. Keldan til fyrstu skráseting av einum slagi er merkt við tali: 1 Svabo (1959), 2 Hansen (1881), 3 Newstead (1904), 4 Jessen og Rasmussen (1922), 5 Henriksen (1929), 6 Jørgensen (1932), 7 Heie (1972), 8 Trolle og Ketil (1994a), 9 Trolle og Ketil (1994b) og 10 Tolsgaard og Jensen (2010). Tó eru nýggjar skrásetingar markaðar við *.

Tað eru nógv sløg, sum ikki eru meira enn 5 mm til støddar, og eisini kann roknast við, at einstøk av hesum sløgum eru staðbundin. Tískil er tað væntandi, at tað enn eru sløg, sum ikki eru skrásett.



**Baraldsteka *Cyphostethus tristriatus* (Fabricius, 1787). Mynd: Jens-Kjeld Jensen.**

## Yvirlit

| **Cicadomorpha** | **Froðusprettuundirhópur** |
|---|---|
| **Aphrophoridae** | - |
| *Philaenus spumarius* (Linnaeus 1758) [5] | - |
| **Cicadellidae** | - |
| *Anoscopus albifrons* (Linnaeus, 1758) [9] | - |
| *Anoscopus flavostriata* Donovan, 1799 [2] | - |
| *Arthaldeus pascuella* Fallën, 1826 [5] | - |
| *Cicadula quadrinotata* (Fabricius, 1794) [5] | - |
| *Macrosteles alpina* Zetterstedt, 1828 [9] | - |
| *Macrosteles laevis* Ribaut, 1927 [5] | - |
| *Macrosteles ossiannilssoni* **Lindberg, 1954** [9] | - |
| *Macrosteles viridigriseus* (Edwards, 1922) [9] | - |
| *Ribautiana ulmi* (Linnaeus, 1758) [9] | - |
| *Streptanus sordida* Zetterstedt, 1828 [2] | - |
| **Ulopidae** | - |
| *Ulopa reticulata* Fabricius, 1794 [9] | - |
| **Fulgomorpha** | **Plantusprettuundirhopur** |
| **Delphacidae** | - |
| *Javesella pellucida* (Fabricius, 1794) [9] | - |
| **Heteroptera** | **Tekuundirhópur** |
| **Acantosomatidae** | **Kjøltekuætt** |
| *Acanthosoma haemorrhoidale* (Linnaeus, 1758) [10] | - |
| *Cyphostethus tristriatus* (Fabricius, 1787) [10] | Baraldsteka |
| *Elasmostethus interstinctus* (Linnaeus, 1758) [10] | Leyvteka |
| **Anthocoridae** | **Nevtekuætt** |
| *Lyctocoris campestris* (Fabricius, 1794) [10] | Reiðurteka |
| **Cimicidae** | **Veggjatekuætt** |
| *Cimex lectularius* Linnaeus, 1758 [1] | Lúsaveggjateka |
| **Coreidae** | **Randartekuætt** |
| *Coreus marginatus* (Linnaeus, 1758) * | - |
| *Leptoglossus occidentalis* Heidemann, 1910 * | Furuteka |
| **Corixidae** | **Bátsmanstekuætt** |
| *Arctocorisa carinata* (Sahlberg, 1819) [2] | Tjarnarteka |
| *Callicorixa wollastoni* (Douglas & Scott, 1865) [2] | Hyljarteka |
| **Lygaeidae** | **Frætekuætt** |
| *Kleidocerys resedae* (Panzer, 1797) [10] | Birkiteka |
| *Spilostethus pandurus* (Scopoli, 1763) [10] | Stásteka |

| | |
|---|---|
| **Miridae** | **Grastekuætt** |
| *Closterotomus norwegicus* (Gmelin, 1790) [10] | Eplateka |
| *Lygus rugulipennis* Poppius, 1911 [10] | Eingjarteka |
| *Pithanus maerkelii* (Herrich-Schaeffer, 1838) [2] | Ríputeka |
| **Pentatomidae** | **Stinktekuætt** |
| *Dolycoris baccarum* (Linnaeus, 1758) [10] | - |
| *Eurydema oleracea* (Linnaeus, 1758) * | - |
| *Eurydema ornata* (Linnaeus, 1758) * | - |
| *Nezara viridula* (Linnaeus, 1758) * | - |
| *Palomena prasina* (Linnaeus, 1761) [10] | - |
| **Rhopalidae** | **Æðratekuætt** |
| *Corizus hyoscyami* (Linnaeus, 1758) [10] | - |
| **Saldidae** | **Støkktekuætt** |
| *Salda littoralis* (Linnaeus, 1758) [2] | Fenteka |
| **Sternorrhyncha** | **Plantulúsarundirhópur** |
| **Aphididae** | **Blaðlúsarætt** |
| *Acyrthosiphon pisum* (Harris, M., 1776) [6] | - |
| *Cavariella archangelicae* (Scopoli, 1763) [7] | - |
| *Cryptomyzus galeopsidis* (Kaltenbach, 1843) [7] | - |
| *Drepanosiphum platanoidis* (Schrank, 1801) [6] | - |
| *Elatobium abietinum* (Walker, F., 1849) [6] | - |
| *Eriosoma ulmi* (Linnaeus, 1758) [6] | - |
| *Euceraphis punctipennis* (Zetterstedt, 1828) [7] | - |
| *Hyperomyzus rhinanthi* (Schouteden, 1903) [7] | - |
| *Jacksonia papillata* Theobald, 1923 [6] | - |
| *Macrosiphum euphorbiae* (Thomas, C., 1878) [7] | - |
| *Metopolophium dirhodum* (Walker, F., 1849) [6] | - |
| *Myzaphis rosarum* (Kaltenbach, 1843) [7] | - |
| *Nasonovia ribisnigri* (Mosley, 1841) [6] | - |
| *Phyllaphis fagi* (Linnaeus, 1761) * | - |
| *Rhopalosiphum padi* (Linnaeus, 1758) [6] | - |
| *Sitobion fragariae* (Walker, F., 1848) [6] | - |
| *Thripsaphis verrucosa* Gillette, 1917 [6] | - |
| **Ortheziidae** | **Skjaldlúsarætt** |
| *Arctorthezia cataphracta* Morrison, 1952 [3] | Sekkjarskjaldlús |
| **Psyllidae** | **Blaðloppuætt** |
| *Cacopsylla pulchra* (Zetterstedt, 1840) [8] | - |

## Tøkkir

Ole Fogh Nielsen og Søren Tolsgaard fyri eyðmerking av nøkrum av nýggju sløgunum.

Fólk kring landið, ið hava funnið og sent høvundunum lívverur og myndir.

Marjun Arge Simonsen og Málráðið fyri ráðgeving í sambandi við føroysku nøvnini.

## Heimildir

Bates, S.L. (2005). Damage to common plumbing materials caused by overwintering *Leptoglossus occidentalis* (Hemiptera: Coreidae). *Canadian Entomologist*, 137(4), 492-496.

Endrestøl, A., & Hveding, H. (2017). *Leptoglossus occidentalis* (Het. Coreidae) erobrer Europa. *Insekt-Nytt*, 42(3), 5-21.

GBIF Secretariat. (2017). GBIF Backbone Taxonomy. Checklist Dataset https://doi.org/10.15468/39omei (tikið niður 02/12-2017).

Gederaas, L., Moen, T.L., Skjelseth, S., & Larsen, L.-K. (Eds.). (2012). *Fremmede arter i Norge – med norsk svarteliste 2012*. Trondheim.

Hansen, H.J. (1881). Faunula insectorum Faeroeensis: Fortegnelse over de paa Faerøerne hidtil samlede insekter. *Naturhistorisk Tidsskrift*, 3(13), 229-280.

Heie, O.E. (1972). Færøernes bladlus (Homoptera, Aphidoidea). *Entomologiske Meddelelser*, 40, 145-150.

Henriksen, K.L. (1929). Hemiptera (excl. Aphidae). In R. Spärck & S.L. Tuxen (Eds.), *The Zoology of the Faroes, Volume II, Part II*. Copenhagen: Andr. Fred. Høst & Søn.

Jensen, J.-K. (2009). Fund af nye og sjældne svirrefluer på Færøerne (2000-2008). *Entomologiske Meddelelser*, 77, 3-7.

Jensen, J.-K., & Bloch, D. (2001). Vespur. *Frøði*, (1), 4-7.

Jensen, J.-K., & Madsen, H.B. (2013). To arter af humlebier yngler på Færøerne (Hymenoptera, Apidae). *Entomologiske Meddelelser*, 81, 1-14.

Jensen, J.-K., & Simonsen, M.A. (2004). Øktur føroyskur frøðinevnalisti. *Fróðskaparrit*, 51, 212-213.

Jessen, K., & Rasmussen, R. (1922). En profil gennem en Tørvemose paa Færøerne. Danmarks *Geologiske Undersøgelser IV*, 1(13), 1-32.

Jørgensen, M. (1932). Aphidae. In R. Spärck & S.L. Tuxen (Eds.), *The Zoology of the Faroes, Volume II, Part II* (pp. 1-9). Copenhagen: Andr. Fred. Høst & Søn.

Newstead, R. (1904). Coccidæ. *Proceedings of the Royal Physical Society of Edinburgh*, 15, 156-157.

PESI. (2017). Pan-European Species directories Infrastructure. http://www.eu-nomen.eu/portal/ (tikið niður 02/12-2017).

Poulsen, J.H. W., Simonsen, M., Jacobsen, J. í L., Johansen, A., & Hansen, Z.S. (1998). *Føroysk orðabók*. Tórshavn: Føroya Fróðskaparfelag.

Svabo, J.-C. (1959). *Indberetninger fra en reise i Færøe 1781 og 1782*. Copenhagen:

Selskabet til Udgivelse af Færøske Kildeskrifter og Studier.

Tolsgaard, S., & Jensen, J.-K. (2010). Nye fund af tæger (Heteroptera) på Færøerne. *Entomologiske Meddelelser*, 78(1), 21-28.

Trolle, L., & Ketil, P. (1994a). *Cacopsylla pulchra* (Zetterstedt, 1838) - (Homoptera, Phylloidea). - New to the Faroe Islands. *Fróðskaparrit*, 41, 99-101.

Trolle, L., & Ketil, P. (1994b). The Leafhoppers (Homoptera, Auchenorrhyncha) of the Faroe Islands. *Fróðskaparrit*, 41, 107-124.